Góðu leikarar, venjarar og hjálparfólk!

Størsta hendingin í føroyskum ungdómsfótbólti nakrantíð. So stutt kann tykkara frálíka avrik á Kýpros lýsast.

Tit eru nú millum 16 tey bestu londini í Evropa. Um ein góðan mánað skulu tit í eitt EM-endaspæl í Kroatia við so mætum fótbóltstjóðum sum Spania, Hollandi og Italia. Tað er einki minni enn heilt ótrúligt!

Hetta er eitt risalop fyri føroyskan ungdómsfótbólt. Vit hava rætt og slætt ikki verið nær námind at spælt okkum víðari í hesum undankappingum áður, og nú standa vit her. Klár til eitt EM-endaspæl. Við o□ føra go□ ða u□ rslitinum hava tit skrivað føroyska i□ tro□ ttasøgu! Hjartaliga, hjartaliga til lukku við ti□ !

Sannførandi avrikini seinasta árið hjá tykkum byggir á miðvíst arbeiði í fleiri ár. Hjá FSF. Hjá venjaratoyminum. Hjá feløgunum kring landið, Og ikki minst hjá hvørjum einstøkum leikara.

Føroyskur fótbóltur er í einari broytingartíð. Føroyskur ungdómsfótbóltur er í einari broytingartíð. Yngra ættarliðið hevur ein meira miðvísan hugburð. Venur meira. Vil liva av at spæla fótbólt. Vil royna seg uttanlands. Og við hesum hugburði røkkur tú langt. Tað hava tit allir prógva í ríkiligt mát við tykkara komandi EM-luttøku.

***

Tað eru góð 40 ár síðan vit føroyingar spældu okkara fyrsta dreingjalandsdyst. Hann var ímóti Íslandi her í Gundadali, og ógvuliga óvæntað vunnu føroysku dreingirnir 1-0.

Fyrstu nógvu árini var dreingjalandsliðsarbeiðið rættiliga óstøðugt, men síðan tíðliga í hálvfemsunum hava føroysk dreingjalandslið á hvørjum ári luttikið í ymiskum kappingum. Úrslitini fyrstu mongu árini vóru einki at reypa av, fleiri stórtap, men kortini vóru einstakir glottar. Eitt nú vunnu Føroyar 1-0 á danska U-17 landsliðnum við Nicklas Bendtner á odda í 2004. Hesir einstøku glottarnar standa kortini EINKI í mát við tykkara avrik seinasta árið. Fyrst í Luksemburg og nú á Kýpros.

***

Avbjóðingin í Kroatia fyrst í mai-mánað verður tykkara største avbjóðing nakrantíð. Tit skulu spæla ímóti tykkara javnaldrum, ið umboða fleiri av bestu feløgum í Evropa. Vit øll, sum hava fylgt tykkara sannførandi avrikum seinasta árið, eru sannførd um, at tit fara at leggja nógv fyri og fyrireika tykkum væl til spennandi dystirnar í Kroatia.

EM-endaspælið verður samstundis ein sýnisgluggi, ið fremstu feløg í Evropa fara at fylgja. Tað er bara at hyggja eftir, hvørjir leikarar hava luttikið í hesari kapping gjøgnum tíðina. Rooney, Fabregas, Kroos og Goetze eru allir millum leikarar, sum gjøgnum tíðina eru kosnir bestu spælarar í EM-endaspælinum fyri U-17 landslið. Og hvør veit um ein Jacobsen, ein Reynatrøð, ein Edmundsson ella Løkin fara at gera hesum heimsstjørnum tað eftir í Kroatia um tveir mánaðir?

Eg vo□ ni og vænti, at tykkara fra□ li□ ka u□ rslit á Kýpros verður við til at slo□ ða fyri enn fleiri frambrotum i□ føroyskum fótbólti. Tykkara avrik higartil og EM luttøkan í Kroatia fer uttan iva at kveikja eina sterka vo□ n og geva neyðuga a□ ræði hja□ leikararum, ið eru yngri enn tit.

Her at enda vil eg enn einaferð ynskja tykkum hjartaliga til lukku við bragdinum á Kýpros. Somuleiðis takki eg Fótbóltssambandinum og øllum feløgunum fyri tykkara o□ troyttandi arbeiði.

Bestu eydnu í fyrireikingunum til EM-endaspælið. Eg gleði meg at fylgja tykkum.!

Takk fyri!

Aksel V. Johannesen

Løgmaður